

**JAN SIMONSEN:**
- Eg skal luttaka í einari talvkapping, men tað fer ikki við so nógvari tið. Eg ælti mær til Norðoyastevnuteitið mikukvøldið, so eg havi sæð tað, áðrenn fólk fortelja mær um alt, sum hevur verið í tí. Síðani fari eg til kappróður, møta fólki, ein túr í býin og so verður vónandi eisini møguleiki at lurta eitt sindur eftir nýggju fløguni hjá Iron Maiden.

# Prestur gleðir seg

Hans Eiler Hammer, sóknarprestur í Klaksvík, gleðir seg til norðoyastevnuna, sum hann heldur vera eina familjustevnu. Men hann heldur tað vera meiningsleyst, at fólk ganga ávirka av rúsdrekka alla stevnuna



MYND: JENS KRISTIAN VANG

*Eyðun Klakstein*

Fyri unga sóknarprestin í Klaksvík, Hans Eiler Hammer, er norðoyastevnan ein familjustevna, sum hann gleðir seg til. Nógv tiltøk - bæði andalig og tímilig - eru at fara til, og hátíðardámurin er við til at sjóða fólkið saman.

Men hann heldur, at tað er fullkomiliga meiningsleyst, at ein partur av fólkinum gongur sjónliga ávirkaður av rúsdrekka alla stevnuna.

- Summi minnast nóg illa, hvat tey hava gjørt, og hvar tey hava verið á stevnuni, og tað skilji eg als ikki. Tað er ov nógvur fyllskapur á summarstevnunum, og eg haldi, at fólk áttu at hugsa um heldur at brúkt meira tíð saman við familjuni, sigur Hans Eiler Hammer.

- Eg havi búð í Noregi í fleiri ár, og har upplivir tú ikki sama fyllskapin sum á stevnunum í Føroyum. Har kemur tað so at siga ikki fyri, at fólk liggja avdottin, tá 17. mai til dømis verður hátíðarhildin.

Hans Eiler Hammer hevur tikið teologiska útbúgving í Noregi, og hann hevur norska konu. Saman eiga tey trý børn, og nú búgva tey á Prestvegi í Klaksvík.

**EIN PERSÓNLIG AVGERÐ**

Hans Eiler Hammer, sum er 30 ára gamal, hevur verið sóknarprestur í Norðoya vestara prestagjaldi síðani 1. juni í 1998.

Pápi hansara var trúboðari í Føroyum, og barnaárini búði Hans Eiler fyri tað mesta í Klaksvík og á Tvøroyri, har pápin eisini virkaði.

- Hóast eg eri uppvaksin í einum trúgvandi heimi, og tað altíð hevur verð natúrligt, at eg eri komin í sunnudagsskúla, á møti og í kirkju, so havi eisini verið noyddur at gera upp við meg sjálvan, hvørja leið eg vildi ganga. Tú kanst ikki vera trúgvandi, tí foreldur tíni eru tað. Tú mást taka eina persónliga støðu, og tað varð eg eisini noyddur at gera, sigur Hans Eilier Hammer.

Og persónliga støðutakanin fekk Hans Eiler at velja tann teologiska vegin. Hann flutti til Noregs, og í Oslo tók hann teologiskt prógv.

- Tá vit fóru at hugsa um at flyta aftur til Føroya, koyrdi eg kring alt Føroyar við konuni. Eg vildi vísa henni so nógvar kirkjur og prestagarðar sum gjørligt, fyri at hon kundi verða við til at taka avgerðina um, hvagar vit skuldu søkja prestastarv, greiðir Hans Eiler Hammer frá.

- Eg segði ikki eitt orð um, at Klaksvík stóð mær nær, tí eg vildi hava hana at taka eina støðu. Tá vit komu á Prestveg í Klaksvík, segði hon, at har vildi hon vera. Tað taki eg sum eitt kall, og tað eri eg fegin um. Tað er gott, at prestur verður kallaður til eitt starv, men hjúnarfelagin skal eisini verða kallaður.

Hans Eiler Hammer fegnaðist um orðini hjá konuni, men hann greiddi henni frá, at har var Henning Bøgesvang í starvi, og har varð hann verðandi í nógv ár afturat.

**TAÐ ER IKKI ALTÍÐ LÆTT**

Men í eini konfirmatión nakað seinni, segði Bøgesvang fyri Hans Eileri, at hann ætlaði at gevast sum prestur í Klaksvík. Hetta var á heysti í 1997, og Bøgesvang segði, at hann fór úr starvinum tíðliga árið eftir.

Hans Eiler var tá undir útbúgving, og skuldi eftir ætlan ikki verða liðugur fyrr enn á jólum í 1998, men tá hann fór aftur til Noregs, tók hann ein rættiligan endaspurt við útbúgvingini, og hann gjørdist liðugur apríl mánaði í 1998.

Hann søkti starvið í Klaksvík og fekk tað við teirri treyt, at hann kundi taka við starvinum í juni mánaði í 1998.

Hans Eiler Hammer kann tí á norðoyastevnu halda tvey ára dagin fyri, at hann fór í starv sum prestur í Klaksvík.

Hesi bæði árini hava verið hendingarík, og ikki minst seinastu vikurnar hevur Hans Eiler verið nógv umrøddur í sambandi við, at hann og tríggir aðrir prestar hava noktað donskum bispum at prædika í teirra kirkjum.

- Vanligt er, at prestar fara til eitt minni prestagjald, tá teir byrja, men eg eri byrjaður í einum av teimum stóru prestagjøldunum, og tað hevur verið ein serliga avbjóðing. Arbeiðið er sera avbjóðandi, men tað er ikki altíð lætt, sigur Hans Eiler Hammer.

- Tað er til dømis ikki lætt, tá framstandandi persónar í lokalsamfelagnum – til dømis ein skúlastjóri – vilja hava meg burtur úr býnum. Tað er trupult, tá tú skalt brúka so nógva orku til at verja teg fyri álopum, tá tú ístaðin kundi brúkt meira tíð til uppsøkjandi arbeiði.

*»Tað er ikki lætt, tá framstandandi persónar í lokalsamfelagnum – til dømis ein skúlastjóri – vilja hava meg burtur úr býnum«*

**KIRKJUFÓLKIÐ Í BÓLKUM**

Hans Eiler Hammer sigur, at tað ávirkar familjuna, at tað eru fólk í býnum, sum ynskja hann, har piparið grør, og at tað til dømis verða savnaðar undirskriftir ímóti avgerðini um at nokta danska bispinum at prædika í Christianskirkjuni.

- Men eg eri fullgreiður yvir, at tað er ikki lætt hjá mær at koma til Klaksvíkar at avloysa Bøgesvang, sum var prestur her í yvir 20 ár. Og tað hevur í grundini verið størsta avbjóðingin hjá mær.Bøgesvang var væl dámdur í Klaksvík, men hann hevði eisini trupulleikar fyrstu árini, tí heldur ikki hann var dámdur av øllum, sigur Hans Eiler Hammer.

- Eg minnist, at Bøgesvang eina ferð kom suður til Tvøroyrar at vitja okkum eitt vikuskifti. Hann vildi bara sleppa burtur frá øllum trupulleikunum í Klaksvík í nakrar dagar. Hetta var stutt eftir, at hann varð byrjaður í Klaksvík.

Hans Eiler Hammer sigur, at hann ikki kann taka við leiklutinum hjá Bøgesvang.

- Vit eru ymisk sum prestar, og síðani eg kom til Klaksvíkar, havi eg roynt at gjørt tað, sum eg havi hildið vera rætt.

- Í Klaksvík er støðan eitt sindur serlig, tí kirkjufólkið gongur í fýra bólkum. Tað eru tey, sum hoyra heima í KFUM & K, Emmaus, Solo Deo Gloria og tey, sum bara koma í kirkjuna. Tey hava ikki somu uppfatan av øllum, men hóast hetta havi eg alla tíðina roynt at hildið fast um, at eg eri prestur hjá teimum øllum, sigur Hans Eiler Hammer.

**SKAL ALTÍÐ VERA TØKUR**

Nú stendur norðoyastevnan fyri durðum, og presturin á Prestvegi æltar sær at njóta stevnuna.

- Prestastarvið er øðrvísi enn øll onnur størv, tí tú skalt altíð vera tøkur. Um fólk ringja eftir tær á miðjari nátt, so skalt tú vera til reiðar at fara út, um tað skal vera. Men onkursvegna skal familjulívið eisini rigga, og á norðoyastevnu royna vit at hugna okkum saman, sigur Hans Eiler.

- Vit eru nógv úti í býnum og úti hjá fólki, og vit fara til alskyns tiltøk. Tey, sum leggja skránna til rættis, duga óføra væl at skipa soleiðis fyri, at tað er nakað fyri øll.

Hans Eiler Hammer heldur, at summarstevnurnar eru við til at knýta fólk saman. Ungfólk fáa nýggjar vinir á stevnunum, og fólk møta gomlum kenningum aftur.

- Men tað er keðiligt, er, at tað er blivin so nógvur fyllskapur á stevnunum, sigur prestur, sum mælir fólki til at drekka minna og halda norðoyastevnuna meira sum eina familjustevnu.

Og onkrastaðni millum Prestveg og Vágstún, fótbóltsvøllin og Klaksvíksveg, fer presturin á Prestvegi at ganga og spáka á norðoyastevnu.

Norðoyastevnan skal haldast, og tað skal hon gerast saman við familjuni.



**KÁRI POULSEN:**
- Eg fari til øll tey stóru tiltøkini, sum fólk vanliga fara til. Og so fari eg helst eisini ein túr í býin.



**FRÓÐI ISAKSEN:**
- Eg skal arbeiða øll kvøldini uttan leygarkvøldið, so tá ætli eg mær í býin ein túr. Eg skal krevja inn til kappróðurin og annars veri eg kontrollur í dansinum hini kvøldini.

MYND: JENS KRISTIAN VANG



*»Tað er keðiligt, er, at tað er blivin so nógvur fyllskapur á stevnunum«*

## Nógv andalig tiltøk

Tað eru nógv andalig tiltøk at fara til um norðaoyastevnuna. Sunnudagin klokkan 11 verður gudstænasta í Christianskirkjuni, har Niels Pauli Danielsen, sóknarprestur, fer at prædika.

Fríggjakvøldið verður ungdómsgudstænasta í Christianskirkjuni, og hesari stendur Hans Eiler Hammer, sóknarprestur, fyri. Á hesi gudstænastu verður eitthvørt tónleikaligt ískoyti eisini á skránni.

Samkoman í Betesda hevur evangeliskar fundir bæði í Betesda og í Vágstúni. Møti verða eisini í Solo Deo Gloria, KFUM & K og Emmaus.

## Andras og Hjalmar røða

Tvey stór fólkalig tiltøk eru á norðoyastevnu. Leygarkvøldið er midnáttarsamkoma í Vágstúni. Kyndlagonga kemur í Vágstún, og Hjalmar Waag Árnason, sum er er íslendskur altingsmaður, men sum er av føroyskari ætt, fer at røða. Aftaná verður fýrverk á Vágsbøi og síðani felagssangur.

Sunnudagin er fólkafundur í Vágstúni. Skrúðgonga við Klaksvíkar Hornorkestri, skótum og ítróttarfólki fer úr Klaksvíksgarðinum og í Vágstún, har Andras Sólstein skal flyta fram røðu. Hetta ger hann vegna Klaksvíkar Hornorkestur, sum júst hevur hildið rundan føðingardag.

## Granskingin opið hús

Granskinarverkæltanin fyri Økismenning, sum heldur til á gomlu politistøðini í Klaksvík, hevur opið hús á norðoyastevnu.

Fríggjadagin frá klokkan 17.00 til 20.00 eru hølini opin fyri almenninginum, og aftur leygardagin frá klokkan 11.00 til 14.00 kunnu fólk støkka inn á gólvið á gomlu politistøðini, sum nú verður nýtt til gransking.